# 11,1 í miðal sum skipari



Hans Myrup fekk tvær virðislønir fyri frágera góða avrik sítt

**56 ára gamli Hans Myrup fekk 11,1 í miðal á Føroya Sjómansskúla. Tað er tað hægsta, sum nakrantíð er givið á skúlanum. Hans Myrup heldur, at tað hevur verið ein fyrimunur í skúlanum, at hann er komin so mikið upp í árini**

PRÓGV
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

11,1 í miðal. Tað er ikki ein og hvør, sum klárar tað. Í farnu viku lósu vit í bløðunum um tvíburar og pisupør, sum høvdu staðið seg væl á studentaskúlunum. Men tað er ikki bara á miðnámsskúlunum, at næmingar hava høg miðaltøl og standa seg framúr væl. Fríggjadagin fekk Hans Myrup handað prógv sum skipari á Føroya Sjómansskúla. Serliga var tað í fiskivinnu og í fiskivinnubúskapi, har Hans Myrup stóð seg væl. Hann fekk 13 í báðum lærugreinunum.

### Kemur ikki av sær sjálvum

Nú eru tað uttan iva mong, sum sita spyrjandi og hugsa, hvussu ber tað til? Tað spyrja vit eisini Hans Myrup um, og aftaná at hava hugsað seg um eina løtu, sigur Hans Myrup, at hann ikki er greiður yvir tað sjálvur.
– Men tað kemur ikki av sær sjálvum, sigur hann skemtandi. – Eg haldi, at tað hevur verið ein fyrimunur at vera komin so mikið langt upp í árini, greiðir hann frá. – Tað er eyðsæð, at tað allar royndirnar ein hevur, koma einum til góðar í skúlagongdini. Og tær útbúgvingarnar eg havi frammanundan, eru avgjørt komnar mær til góðar, sigur Hans Myrup.

### Útbúgvin lækni

Hans Myrup er dani, og er frammanundan útbúgvin lækni. – Hugurin hevur altíð verið til sjógvin, men tá eg var ungur, var tað ikki akkurát tað, sum tað var vanligt at útbúgva seg innanfyri. So eg læs til lækna, greiðir Hans frá, sum eisini hevur arbeitt sum lækni í Føroyum.
Hans Myrup hevur eisini eina aðra útbúgving, og tað er tað, sum á donskum eitur kystskipari. Tann útbúgvingin er ikki til í dag, men svarar hon nøkulunda til heimaskiparaútbúgvingina her heima.

### Útbúgving krevst

Hans Myrup býr í dag saman við føroysku konu sínari í Fámjin. Men áðrenn hann kom her til, hevur hann verið í Grønlandi í nógv harrans ár og arbeitt á sjónum. Tað byrjaði í smáum, men at enda hevði hann so eitt skip saman við konuni, sum varð brúkt til nógv ymisk endamál. T.d. sum fraktskip, til ferðafólkaflutning og at gera seismikkkanningar.
Í 2004 var ætlanin so at keypa eitt størri far, men hetta fór í vaskið, og tá var tað, at Hans Myrup gjørdi av at lesa til skipara. – Í dag krevja tey jú eina útbúgving til alt, og tí fór eg undir lesnaðin, sigur Hans Myrup, sum í dag leitar eftir fastari hýru og fáa siglingstíð.
Nógv eru tey, sum aftra seg at fara undir nakra útbúgving, tá tey eru komin eitt sindur upp í árini. Útbúgving hoyrir ungdóminum til, verður ofta sagt, men hetta er Hans Myrup ikki heilt samdur í. – Eg síggi ongan nevniverdan trupulleika í at ikki at vera ungur, tá eg læs. Sjálvandi vóru meginparturin av teimum lesandi væl yngri enn eg, men eg hevði mínar fyrimunir við øllum royndunum eg havi, og sum tey sjálvsagt ikki hava, tá tey eru so mikið nógv yngri. Á mínum aldri havi eg heldur ongin børn at hugsa um, sum fleiri av hinum høvdu, sigur Hans Myrup, sum vil mæla øllum til at lesa, sum ivast men hava hug til tað.

# Sjómansskúlin, maskinmeistaraskúlin og brandskúlin eru vorðnir til Vinnuháskúlan

**Fríggjadagin varð kunngjørt, at sjómansskúlin, maskinmeistaraskúlin og brandskúlin framyvir fara at virka undir heitinum Vinnuháskúlin, og at skúlarnir hava fingið eitt nýtt felags búmerki**

VINNUHÁSKÚLIN
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*




*Hans Jóhannus á Brúgv greiðir frá nýggja búmerkinum og navninum*

Fríggjadagin fingu næmingar á Sjómansskúlanum handa prógv eftir lokna skúlagongd. Hetta var eitt hátíðarhald í sjálvum sær, men tað var eisini annað á skránni henda dagin.
Í samband við próvhandanina kunngjørdi Hans Jóhannus á Brúgv, stjóri, at sjómansskúlin, maskinmeistaraskúlin og brandskúlin framyvir fara at virka undir navninum Vinnuháskúlin. Hans Jóhannus á Brúgv greiddi frá, at í navninum liggur, at skúlin er ein háskúli, sum skal útbúgva leiðarar og fólk til vinnuna.
– Navnið er breitt, vanligt og partaleyst og fevnir á einfaldan hátt um teir tríggjar skúlarnar, sum renna saman. Navnið greiðir í sjálvum sær frá, hvat virksemi skúlans er, varð sagt fríggjdagin.
Vinnuháskúlin hevur eisini tilognað sær eitt navn til altjóða marknaðin, og tá rópar hann seg Centre of Maritime Studies & Engineering.
Hans Jóhannus á Brúgv sigur, at orsøkin til nýggja felagsnavnið er, at tað er neyðugt fyri at tryggja ein felags samleika. – Soleiðis sleppa vit eisini undan "tit" og "vit" problematikkinum, sigur Hans Jóhannus á Brúgv, stjóri.
Navnið og eisini búmerkið eru funnin aftaná eina navna- og búmerkjakapping, og tá skúlarnir byrja aftur 7. august, verður tað undir nýggja heitinum og búmerkinum.

### Nýggja búmerkið

Nýggja búmerkið er samansett av trimum formum, sum allir eru eins. – Tríggir partar koma saman og mynda eina harmoniska heild. At partarnir standa eins yvir fyri hvørjum øðrum merkir, at hvør partur er líka stillaður yvir fyri hinum báðum og hevur somu rættindi til felags ágóðarnar. Hvíta plássið í miðjuni avmyndar samanrenningina, tí miðjan er felags økið, bindiliðið, sum allir partar standa líka yvir fyri, verður sagt um búmerkið.
Hvør formur í búmerkinum hevur sín lit; myrkablátt, ljósablátt og appilsingult. Myrkablái liturin skal minna um sjógvin og vísir til sjómansskúlan. Ljósablái liturin um skal minna um jarn og vísa til maskinmeistaraskúlan, og appilsinguli liturin skal minna um eld og vísa til brandskúlan.



*Viðgjørd mynd av Sjómansskúlanum við nýggja búmerkinum á*